# Vága kommuna

**FUNDARBÓK 2013**

**31**/24-06-2013

| | | |
|---|---|---|
| **Fundur** **nr. 9.**<br>Tíð: **19. juni kl. $18^{00}$.**<br>Stað: **Miðvágs Skúli** | Almennur fundur | |
| Fundardagar í 2013:<br><br>07/01, 30/01, 13/02, 27/02, 20/03, 17/04, 29/05, 19/06, | **Møtt:**<br>Johannes Ellefsen, Dánial Johansen, Marjus Dam, Rósa Samuelsen, Egil Petersen, Jógvan Sjúrður Hansen, Jonhard Joensen, Albert Ellefsen, Dánjal Thomsen, Marin Bláberg og S. Jóhannis Joensen.<br>Skrivari: Georg Hansen | **Uttan:**<br>Albert Ellefsen og Egil Petersen. |

| | |
|---|---|
| Mál nr. 2012-24-00388<br>Vága Skot søkir um loyvi at nýta “Svimjihylin” í Miðvági til venjingar og kappingar v.m.<br>M.Tr.N. mælir til at gera avtalu um nýtslu av svimjihylinum.<br>T.N. mælir til at góðkenna uppskot um avtalu.<br>F.N. mæla til at góðkenna uppskotið um avtalu við smærri broytingum. | Avtalan var samtykt. |
| Mál nr. 2006-22-00155<br>Uppskot um felags reglugerð fyri kirkjugarðarnar í kommununi.<br>M.Tr.N. mælir til at samtykkja uppskotið við teirri treyt, at ikki skal vera loyvt at grava yvir grivnar gravir.<br>F.N. tekur undir við tilmælinum hjá M.Tr.N. við teirri broyting, at um ynski verður sett fram frá avvarðandi um at grava í somu grøv, kann loyvi gevast til tað. | Samtykt við teirri treyt, at ikki skal vera loyvt at grava yvir grivnar gravir. Tó um ynski verður sett fram frá avvarðandi at grava í somu grøv, kann loyvi gevast til tað. |
| Mál nr. 2013-23-00169<br>Miðvágs Missiónshús søkir um stuðul til arbeiði teirra.<br>M.Tr.N. mælir til at veita stuðul.<br>F.N. mælir til at veita ein stuðul uppá kr. 5.000,-. | Samtykt at veita stuðul uppá kr. 5.000,-. |
| Mál nr. 2013-46-00165<br>Keturnar í eldra bátahylinum í Miðvági eru í sera ringum standi. Kristoffur Gaardlykke hevur kannað tær og er komin til tað niðurstøðu, at fyri at trygdin skal vera í lagi, er neyðugt at skifta helvtina í ár og hina helvtina komandi ár. Tilboð uppá at skifta keturnar fyriliggur.<br>T.N. mælir til at skifta helvtina av ketunum í ár.<br>F.N. tekir undir við tilmælinum hjá T.N. | Samtykt at skifta helvtina av ketunum í ár. |

# Vága kommuna

**FUNDARBÓK 2013**

**32**/24-06-2013

| | | |
|---|---|---|
| **Fundur** **nr. 9.**<br>Tíð: **19. juni kl. $18^{00}$.**<br>Stað: **Miðvágs Skúli** | Almennur fundur | |
| Fundardagar í 2013:<br><br>07/01, 30/01, 13/02, 27/02, 20/03, 17/04, 29/05, 19/06, | **Møtt:**<br>Johannes Ellefsen, Dánial Johansen, Marjus Dam, Rósa Samuelsen, Egil Petersen, Jógvan Sjúrður Hansen, Jonhard Joensen, Albert Ellefsen, Dánjal Thomsen, Marin Bláberg og S. Jóhannis Joensen.<br>Skrivari: Georg Hansen | **Uttan:**<br>Albert Ellefsen og Egil Petersen. |

| | |
|---|---|
| Mál nr. 2013-42-00172<br>Sóljugarður søkir um loyvi at byggja bát í garði teirra á matr. nr. 328a.<br>T.N. mælir til at geva byggiloyvi.<br>F.N. mælir til at geva byggiloyvi. | Samtykt at geva byggiloyvi. |
| Mál nr. 2013-23-00158<br>Vága Samferðslusøga kemur ætlandi út í heyst. Í hesum sambandi søkja høvundarnir um, at áur játtaður stuðul uppá kr. 25.000,- verður fluttur teimum.<br>F.N. mælir til at veita stuðul uppá kr. 25.000,-. Upphæddin verður tikin av játtanini Stuðul til Mentan. | Samtykt at veita stuðul uppá kr. 25.000,-. |
| Mál nr. 2013-11-00183<br>Fyrsta viðgerð av Eykaætlan EXTRA13-2:<br>Flyta játtan frá §3 til §1 kr. 111.500,-.<br>Hækka játtan til skúlan kr. 450.000,-. (tak og serstova)<br>Hækka játtan til kommunal virkir kr. 85.000,-. (bátahylur)<br>F.N. viðmælir. | Samtykt. |
| Mál nr. 2013-41-00150<br>Helga Jacobsen, Liljan Thomsen, Sjúrður G. Petersen og Landsverk um marknaumskipan millum matr. nr. 240a og veg “aø” í Sandavági.<br>T.N. viðmælir. | Viðmælt. |
| Mál nr. 2013-41-00066<br>Osmund Joensen bjóðar kommununi at eiga gøtuna, sum gongur gjøgnum stykki hansara matr. nr. 290a í Sandavági.<br>T.N. Viðmælir. | Samtykt at taka av tilboðnum. |

Fundurin lokin kl. $19^{00}$.